SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgrei slutí : 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

NÝTT



**Tórshavn: Nýggj arkiteknaði sethús til sølu**
Tildugøta/Djóni í Geilggøta!
matr.nr. 704d, stødd uml.410 m2.
Sethús ella tvær sjálvstøðugar íbúðir í gerð, væntandi liðugt komandi vár, gólv vídd íalt 180 m2 + úthús 16 m2 . Keyparin kann fáa ávirkan á innrætningina, eisini køk, bað og gólv. Ognin verður klødd við rotfríðum brettum, vindeyguni mahogni, liðug viðgjørd hvít málaði, takið svartir taksteinar. Alt úr besta tilfari.Orkusparandi hitaverk við hitapumpu.
Ognin kemur at liggja við tvær blindar gøtur, Djóni í Geil gøta/Tildugøta. Gott útsýni yvir býðin og út á fjørðin.
Tætt við Eysturskúlan og beint yvirav dagstovninum ” Lítliskógur” Skjótt til gongu oman í miðbýin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Vestmanna: Sethús til sølu**
Hoygarðurin.
Garðavegur, matr. nr.131p, Vestmanna, grundøki uml. 400 m2.
Góð gomul sethús við miðhædd, loft og hálvum kjallara.
Húsini eru bygd uml. 1920, stødd 10 x 10 alin.
Miðhæddin: gong, baðirúm, køkur við trappu til loft, matstova og stova. Loftshæddin: hjúnarrúm og eitt kamar úti á loftinum.
Kjallarin er ikki innrættaður.
Húsini hava laðaða kjallarahædd, yvirtromin timbur klødd við zink.
Tekjan er jarn á brettum.
Húsini eru hugnalig við tilbygdum duri og leysum hjalli, urtagarður við giring, eisini vælegnað sum summarhús, kunnu lætast sum tey standa við innbúgvi, klár at flyta inn í.
Húsini liggja sera frítt fyri, sera vakurt og gott útsýni í allar ættir.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Tórshavn: sethús til sølu**
matr. nr. 706b,grundøkið 432 m2 Djóni í Geilgøtu 61
Stór sethús í trimum hæddum, við íbúð í kjallarinum.
Húsini eru upprunaliga bygd 1965 men stórur partur av húsinum eru nýístandgjørd,
kjallaraíbúðin er nýggj, øll sum hon er.Húsini eru íalt uml. uml.225 m2.
Húsini hava stoypta grund og klædningurin er rotfrítt træ.Tey flestu vindeyguni eru skift ár 1998/2000.
Loftshædd: sjónvarpstova, 3 kømur.Stovuhædd: durur, gong, trappa til loft, køkur,stova,
baðirúm,hjúnarrúm og 1 kømur.Kjallarahædd:sjálstøðug íbúð við egnari inngongd:
gong, køkur/stova , 2 kømur, wc við brúsu og fýrrúm/vaskikjallari.
Húsini liggja væl fyri,urtagarður og stór grasfløta frammanfyri húsini, beint við Eysturskúlan, tætt við dagstovn og skjótt til gongu oman í miðbýðin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Miðvág: sethús og verkstaðsbygningur til sølu.**
Leitisvegur, matr.nr.177e, grundøki 569 m2.
Húsini eru upprunalig bygd 1956, stoypt upp, eru í trimum hæddum íalt uml.171 m2 hvør hæddin 57 m2 .
Kjallarahædd: er ikki innrættaður.
Miðhædd: gong,køkur, stova, trappa til loft og til kjallarahæddina.
Loftið:gong,hjúnarúm,3 kømur,baðiverðilsi. Húsini eru í góðum standi, øll gólvini eru tey gomlu brettuni, nøkur av teimum eru pussaði av nýggjum, allir radiatorar skiftir, oljutangi, oljufýr, kloakkrør og rottangi eru skift, eisini drena og steinsett av nýggjum kring húsið, verkstaði/garagu, hetta er gjørt 2004-2005.
Verkstaðurin/garaga er í tveimum hæddum, høllin 77 m2 . Á loftinum er innrættað 36 m2 skrivstovu/teknistova. Bygningurin er væl egnaður bæði til snikkaravirkið og ella bilverkstað v.m.
Verkstaðsbygningurin er góðkendur sum læruppláss.Ognin liggur frítt fyri, mitt í bygdini, gott og frítt økið bæði framman og aftanfyri húsini.
Girðing er um húsini, nýanlagdur urtagarður við runnum terassa løgd við vøkrum "Herregårdsflisum".
**Verða seld um nøktandi boð verður givið!**



**Tórshavn: Sethús til sølu**
matr. nr. 648g, stórt 367 m2 Djóni í Geilgøtu 18
Væl umsitin sethús, stór íbúð í kjallarinum.
Húsini eru upprunaliga bygd 1953 í tveimum hæddum, stovuhæddin uml.127m2,kjallarahæddin uml.160 m2.
Húsini eru stoypt upp, takið er galv.stál skift 1988, ein stórur partur av vindeygunum eru skift 1991.
Stovuhædd:gong,wc, køkur,trappa niður í kjallarin,stova,hjúnarúm við egnum baðirúm og wc.
Kjallarahæddin: gong, køkur/stova ,hjúnarúm, 2 kømur, baðirúm við brúsu og vaskimaskinu, gong til fýrrúm,vaskikjallari, skrivstova, trappa til stovuhæddina.
Húsini liggja væl fyri venda væl móti sólini, stóran altan, vakaran urtagar,10.min.frá miðbýnum og tætt við skúla.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**

Sosialurin 341800



Fimleikaárið 2006/07

**Stórkappingarfimleikur**

Úttøka til stórkappingarfimleik hjá Fimleikafelagnum Ljósinum verða mánadagin 28. aug., týsdagin 29. aug. og hósdagin 31. aug í Eysturskúlanum:

Fyri pinkur føddar 1997-2000
allar dagar kl. 15.45 - 17.30

Fyri smágentur føddar 1993-1997
allar dagar kl. 17.15 - 19.00

Fyri gentur føddar 1991-1993
allar dagar kl. 18.45 - 20.30

Øll eru vælkomin at royna seg, og kravið er at man møtir upp til allar venjingar.
Úttøkan er ókeypis.



TEAM85

**Fimleikafelagið Ljósið**


# VENJINGARTÍÐIR HJÁ NEISTANUM 06-07

NEISTIN

Upplýsingar um venjarar o.a. sí www.neistin.fo

| Lið | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdag | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|---|---|
| Kvinn. 1-2 | 18-20 HH | 20-21 HH | | 18.30 - 20 HH | |
| Kvinn. 2b | 19-20 HH | | 21-22 GH | | |
| Kvinn. 3 | | | 21-22 GH | | |
| Kv. 23 Kv. Ungl. | | | 19-20 HH | | |
| G. 17 | 16.10-17.05 GH | | | 17-17.45 HH | 21-22 HB+GH |
| G. 14 (7.-8. fl.) | | | 18-19 HH | 17.45-18.30 GH | |
| G. 12 (5.-6. fl.) | 18-19 GH | 14.15-15.30 GH | | | 16-17 HH |
| G. 10 (3.-4. fl.) | 15.15-16.10 GH | | 16-17 HH | | |
| G.+D. (2. fl.) | | 13-14.15 GH | | | |
| G. mini og Dr. | | | | 17-17.50 GH | |
| Menn 1-2 | 19-20 Styrki+svimj | 21-22.30 HH | | 18.30-20 HH | 20-21 HH |
| Menn 3. | | 22-22.30 (vektir) 22.30-23 HH | | | |
| D. 21 M. Ungl. | | | 20-21 GH | | |
| D. 17 (9.-11. fl.) | 17.05-18 GH | | | 17.45-18.30 HH | |
| D. 14 (7.-8. fl.) | | | 17-18 HH | 16-17 HH | 15-16 GH |
| D. 12 (5.-6. fl.) | 16.30-18 HH | | | 15-16 HH | 15-16 GH |
| D. 10 (3.-4. fl.) | 14-15.15 GH | | | | 14-15 GH |

Styttingar: GH = Gundadalshøllin · HH = Høllin á Hálsi


SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgrei slutí : 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

**Sandavágur: Handilsbygningur til sølu**
matr. nr.215, grundøki 316 m2.
Bygningur í trimum hæddum, stødd hvør hæddin 90 m2 + ein garasja 23 m2.
Húsið er bygt 1957 stoyptur upp.
Kjallarin: handilshøli og trappa uppá miðhæddina + eitt kjallararúm.
Miðhæddin:handilshøli, tekøkur og trappa uppá loftshæddina.
Loftshæddin: handilshøli, wc og klárt til te køk.
2 leigumál eru í bygninginum og loyvið fyriliggur at byggja eina hædd uppá garasjuna.
Bygningurin liggur væl fyri mitt í gomlu bygdini og parkeringsøki er til ognina.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**